# Ógreitt svar um ríkisfelagsskapin

**- Tað er burturvið at pástanda, at tað eru tríggir javnbjóðis partar í ríkisfelagsskapinum. Hetta sigur Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, eftir at hava fingið svar uppá fleiri fyrispurningar til Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra. Tórbjørn Jacobsen vil hava greiðari svar.**

MAGNUS DAM
*Christiansborg*

**Fyrispurningur:** Tórbjørn Jacobsen gjørdist ikki nógv klókari av at spyrja danska forsætisráðharran, hvat hann leggur í orðið ”ríkisfelagsskapur.” Svarið frá forsætisráðharranum, sum er skrivað í Løgmálaráðnum, vísur, at tað lekur millum teori og praksis, heldur Tórbjørn Jacobsen. Hann fer tí at seta løgmálaráðharranum ein nýggjan fyrispurning, har hann biður um eitt meira útgreinandi svar.

Tórbjørn Jacobsen vildi hava at vita, hvønn løgfrøðiligan týdning, forsætisráðharrin leggur í ríkisfelagsskapin. Eisini vildi hann hava at vita, nær føroyska, grønlendska og danska fólkið á demokratiskan hátt hava gjørt av at fara saman í ein felagsskap.

Uppá seinna spurningin fær Tórbjørn Jacobsen eitt stutt og greitt svar: Hvørki danska, føroyska ella grønlendska fólkið hava á fólkaatkvøðum tikið avgerð um at ganga saman í ein ríkisfelagsskap.

Upp á fyrra spurningin sigur Løgmálaráðið, at danska ríkið sambært grundlógini er sett saman av trimum javnsettum pørtum: Danmark, Føroyum og Grønlandi.

Løgmálaráðið leggur afturat, at ríkiseindin setur ávís mørk fyri, hvørji málsøki kunnu latast yvir til eitt heimastýri innanfyri karmarnar á ríkisfelagsskapinum.

Eitt nú kunnu føroyingar bara taka á seg málsøki, sum viðvíkja Føroyum – ikki málsøki, sum viðvíkja Danmark og Grønlandi ella øllum ríkinum sum heild. Tað eru nøkur viðurskifti, sum viðvíkja øllum ríkinum, sum ikki kunnu latast føroyska heimastýrinum. Hettu eru viðurskifti sum Hægstirættur, ríkisborgaraviðurskifti og verju-, trygdar- og uttanríkispolitikkur. So leingi Føroyar eru partur av Ríkisfelagsskapinum, kunnu vit ikki yvirtaka hesi málsøkini.



*Tað lekur millum teori og praksis í danska Løgmálaráðnum, tá ið spurt verður um týdningin av ríkisfelagsskapinum, heldur Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður.*

## Ósamsvar

Men júst her heldur Tórbjørn Jacobsen, at ósamsvar er í tí, sum Løgmálaráðið sigur.

- Tú kann ikki fyrst pástanda, at talan er um tríggjar javnbjóðis partar og so beint aftaná pástanda, at tað eru nøkur viðurskifti, sum vit ikki kunnu fáa ábyrgdina av í Føroyum, tí hesi – harav nógv teirra viðvíkja Føroyum - skulu stýrast úr Keypmannahavn. Hvussu kanst tú tá pástanda, at talan er um tríggjar partar, sum allir eru javnt settir, spyr Tórbjørn Jacobsen.

Og hann noyðist ikki við at sleingja spurningin út í luftina. Hann vil hava eitt greiðari svar uppá spurningin, og í gjár setti hann tí løgmálaráðharranum enn ein fyrispurning um málið.

Í fyrispurninginum biður hann løgmálaráðharran, Lene Espersen, greiða frá, um hon heldur fast um pástandin, at talan er um tríggjar javnbjóðis partar í ríkisfelagsskapinum.

Í viðmerkingunum vísur Tórbjørn Jacobsen millum annað á, at Føroyar og Grønland kunnu ikki umsita málsøki, sum liggja uttanfyri tey bæði londini. Men Danmark kann hinvegin umsita málsøki, sum viðvíkja bæði Føroyum og Grønlandi.

Myndugleikarnir í Føroyum og Grønlandi fáa ikki so frægt sum innlit í avtalurnar, sum loyva USA og NATO at brúka Grønland og Føroyar í hernaðarligum høpi, sigur Tórbjørn Jacobsen, sum hevur ilt við at síggja, at hetta er í tráð við pástandin um, at ríkið er ein eind við trimum javnbjóðis pørtum.

## Tekniskt men neyðugt

Tórbjørn Jacobsen viðgongur, at talan er um rættiliga tekninskar fyrispurningar. Men teir verða settir av prinsipiellum orsøkum fyri at fáa greiðu á, hvat danir veruliga leggja í ríkisfelagsskapin.

Hetta verða ikki seinastu fyrispurningarnir, sum koma at snúgva seg um hesi viðurskiftini. Higartil hevur hetta bara verið teoretiskt tos hjá nøkrum fáum fólkum, men Tórbjørn Jacobsen vil hava eina greiða útmelding frá stjórnini og Fólkatinginum. Spurningarnir skulu síggjast sum ein liður í arbeiðinum hjá Tjóðveldisflokkinum og Norðuratlantsbólkinum í Fólkatinginum, sum hava til endamáls at vinna Føroyum og Grønlandi sjálvstýri.

NORÐOYA SPARIKASSI

Ársaðalfundur

Ársaðalfundur Norðoya Sparikassa verður fríggjadagin 22. februar 2002 kl. 19.00 á Klaksvíkar Sjómansheimi við hesi dagskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing umsjónarráðsins um virki sparikassans í farna ári.
3. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
4. Val av limum í umsjónarráðið.
5. Val av grannskoðarum.
6. Uppskot um broytingar í viðtøkum og valreglum sparikassans
7. Uppskot frá stjórn, umsjónarráði ella umboðsráðslimum.
8. Ymiskt

Umsjónarráðið

Ósávegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík
Tel: 475000 Fax: 476000 Teldupostur: ns@ns.fo www.ns.fo

# Fólkatalið í Føroyum veksur

**Hagtøl frá Landsfólkayvirlitinum vísa, at samlaða fólkatalið í Føroyum er vaksandi. Eisini flyta fleiri fólk til Føroya, enn tað flyta fólk úr Føroyum**

HAGTØL
*Ingrid Bjarnastein*

Tórshavnar, Klaksvíkar, Runavíkar, Tvøroyrar og Fuglafjarðar kommuna eru tær størstu kommunurnar í landinum, og vísir tað seg, at einasta kommunan av hesum, sum ikki stendur í vøkstri er Klaksvíkar kommuna. Í Klaksvík er fólkatalið seinasta árið minka við trimum fólkum, meðan allar hinar kommunurnar hava økt munandi um íbúgvaratalið.

Tórshavnar kommuna veksur við stórari ferð. Frá 1. jan. 2001 til 31. des. 2001 er íbúgvaratalið vaksið frá 16.786 til 18.067. Í 2001 eru 1118 fólk flutt til Havnar, meðan 954 eru flutt úr Havnini. Nógv flest av fólkunum, ið flyta til Føroya flyta til Havnar, meðan Klaksvíkar og Runavík eru á ávíkavist øðrum og triðja plássi. Av tí, at Tórshavnar Kommuna er størsta kommuna í landinum, flyta eisini flest fólk úr kommunini, meðan stórt lop er til Klaksvíkar og Runavíkar kommunu.

Tað eru eisini nógv flest børn fødd í Tórshavnar kommunu, meðan Klaksvíkin og Runavíkin enn eru nummar tvey og trý. Í Runavík eru dupult so nógv børn fødd, sum tað eru fólk deyð, meðan tað eru meira enn dupult so nógv fólk fødd í Havn, enn tað eru deyð.

31. des. 2001 búðu í Føroyum 46.999 fólk, og hetta sigur so mikið sum tað, at fyrst føddi føroyingurin 2002, var eisini føroyingur nummar 47.000 búsitandi í Føroyum.



Sleikisneis latin til løgregluna:

# Ein feril av amfetamin



*Ein sleikisneis er ikki altíð bara ein sleikisneis vísir tað seg. Ein feril av amfetamin var at finna í hesari sneisini.*
*mynd: Jens Kristian Vang*

**Løgreglan hevur higartil funnið ein feril av amfetamin í sleikisneisini, sum ein ung genta lat løgregluni, eftir ein tilburð í Havn seinasta vikuskiftið. Løgreglan tekur málið í størsta álvara**

RÚSEVNI
*Heri á Rógvi*

Í vikuni kom ein ung genta á gátt hjá løgregluni. Við sær hevði hon eina sleikisneis ella ein slikkipinn, sum onkur eisini kallar tað. Hennara frágreiðing var, at hon hevði fingið hesi sleikisneisina frá einum ókendum mannfólki tíðliga sunnumorgunin. Ein vinkona hjá henni hevði eisini fingið eina tílíka sleikisneis. Tá vinkonan hevði etið sneisina, so stóð illa til við gentuni, og hon kendist seg heilt "undarligt". Tann unga gentan valdi at goyma sína sleikisneis, tí hon hevði mistanka um, at okkurt ikki var heilt rætt. Gentan fór tí til løgregluna við sleikisneisini.

Løgreglan tekur málið í størsta álvara, og sneisin er send til Danmarkar til fleiri kanningar. Løgreglan í Føroyum hevur eisini gjørt kanningar, og kanningar higartil hava víst, at sleikisneisin inniheldur ein feril av amfetamin. Hetta skal tó takast við fyrivarni, tí tey mongu litevnini og annaði sleikisneisini kunnu eisni geva útslag í kanningunum. Tískil fæst tað ikki endaliga at vita, hvat er í sleikisneisini fyrr enn í komandi viku, tá kanningarnar eru lidnar.

Lars Müller, p.a. á kriminaldeildini hjá Løgregluni í Føroyum, upplýsir, at um tað er soleiðis, at talan er um amfetamin ella annað evni, so hevur løgreglan fingið ein stóran trupulleika at dragast við. Lars gitar sær til, at hetta kann vera ein roynd at skapa ein marknað í Føroyum fyri tílíkum evnum.

Hann veit eisini at siga, at prísurin á rúsevnum í Føroyum er farin upp í seinastuni. Eitt gram av hassj kostar nú einar 200 kr./g. Til samanberingar kostar eitt gram 25 kr. í Danmarkar. Prísurin í Grønlandi liggur um heili 1.200 kr. fyri hvørt grammi.

Lars Müller veit at siga, at amfetamin og ekstasy eru evni, sum løgreglan hevur lagt merki til tey seinastuni árini.

Hjalti Gunnarstein, Tjaldurs Apotek, upplýsir, at amfetamin er eitt sera vandamikið evni, sum minnir um ekstasy.

– Talan er um eitt sera vandamikið og tørvelvandi dusandi rúsevni, sum setur meira lív í fólk. Míni ráð eru at halda seg langt vekk frá evnunum, tí hjáárinini eru mong, og ringt er at sleppa burturúr misbrúkinum, sigur Hjalti Gunnarstein.

## Kenna einki til

Í teimum báðum náttklubbunum, Club20 og Platform, sum húsast í bygningini hjá Havnar Klubba, kenna tey als einki til hvørki sleikisneisir ella tílík evni.

Havgrímur Johannesen, stjóri fyri Platform, hevur ongantíð merkt nakað til rúsevnismisnýtslu á hansara dansistaðið, og hann tekur harðliga avstand frá tílíkum.

Taða sama er galdandi fyri Toni Dam, stjóri fyri Club20. Hann upplýsir, at teir einki vilja hava at gera við tílík evni. Hetta tekur eisini grundarlagið undan okkum, sigur Toni Dam.

Báðir klubbarnir hava samstarv, har fólk, sum eru kend fyri at selja rúsevni, fáa atgongubann yvir eitt longri tíðarskeið, og har er eingin bøn, verður sagt.

Høgni Hoydal:

# Eg haldi allar avtalur

**– Eg vil ikki fara út í eina persónligt stríð gjøgnum fjølmiðlarnar. Eg havi hildið meg til allar gjørdar avtalur, og hevur løgmaður okkurt at tosa við meg um, kann hann venda sær til mín persónliga, sigur Høgni Hoydal**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Høgni Hoydal er alt annað enn fegin um, at løgmaður enn einaferð hartar hann í fjølmiðlunum.

– Eg vil ikki fara út í eina persónligt stríð gjøgnum fjølmiðlarnar. Eg havi hildið meg til allar gjørdar avtalur, og hevur løgmaður okkurt at tosa við meg um, kann hann venda sær til mín persónliga, sigur Høgni Hoydal.

Sum heild hevur Høgni Hoydal ringt við at skilja, hví løgmaður kennir tað vera neyðugt at fara í fjølmiðlarnar við atfinningum móti sær.

– Eg havi ongantíð valt at nýta fjølmiðlarnar til tílíkan orðadrátt, og tað ætli eg at halda áfram við. Vit eiga at kunna at samskifta upp á aðrar mátar enn hendan, sigur Høgni Hoydal, sum er sera harmur um, at løgmaður velur hesa leiðina.

– Kann løgmaður vísa á, at eg havi brotið nakran avtalu, so skal eg fegin viðganga tað, men eg meti meg ikki hava brotið nakra avtalu, og tí haldi eg ikki, at løgmaður hevur nakra orsøk til at koma við tílíkum at finningum, sigur Høgni Hoydal.

Varaløgmaður er í løtuni uttanlands í arbeiðsørindum. Tað var á uttanlandsferðini, at hann tosaði við útlendskar fjølmiðlar.

– Eg kann bert staðfesta, at útlendskir fjølmiðlar hava sera stóran áhuga fyri hesum málinum, og eg havi sagt teimum tað sama, sum eg havi sagt mangar ferðir áður. Eg meti komandi løgtingsval sum ein atkvøðugreiðslu um fullveldi, tí somu ferð, sum tað gongur nú, kann ein fólkaatkvøða vera innan fýra ár. Eg veit ikki, hvar Fólkaflokkurin fær hetta við tólv árum frá, men hetta kemur í øllum førum ikki úr løgtingssamtyktini um sjálvstýri Føroya fólks, sigur Høgni Hoydal.

Høgni Hoydal kemur aftur til Føroya fríggjadagin.

Rani Nolsøe:

# Hava nokk við býráðnum

**– Eg havi nóg mikið at gera í býráðnum, og eg vil satt at siga heldur røkja hetta starv til fulnar, enn at royna meg í landspolitikki, sigur Rani Nolsøe, sum ikki valdi at stilla upp til løgtingsvalið, hóast hann stóð á listanum til seinasta uppstillingarfund**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Rani Nolsøe var á valevnalistanum hjá Tjóðveldisflokkinum til fólkatingsvalið, men hann er ikki at finna á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Norðoyggjum til løgtingsvalið. Hann var í uppskoti á onkrum av innleiðandi uppstillingarfundunum, men tá ið tað kom til stykkis, valdi Rani Nolsøe ikki at stilla upp.

– Eg havi valt at nýta mína orku upp á býráðsarbeiðið. – Eg havi nóg mikið at gera í býráðnum, og eg vil satt at siga heldur røkja hetta starv til fulnar, enn at royna meg í landspolitikki, sigur Rani Nolsøe.

Hann metir, at Klaksvíkin stendur frammanfyri so stórum broytingum, at hann vil nýta alla orku til hetta. Hann nevnir eitt nú, at ein komandi undirsjóvartunnil setir stór krøv til kommununa, samstundis sum kommunan enn ikki heilt er komin fyri seg eftir sváru kreppuna fyrst í nýtiárunum.

Rani Nolsøe ber tó ongan ótta fyri valevnalistanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Norðoyggjum.

– Eg meti vit hava ein sterkan lista, sum eisini er ein góður javnstøðulisti, sigur Rani Nolsøe.

Rani metir tvey mál hava størstan týdning tey komandi fýra árini fyri Tjóðveldisflokkin.

– Fullveldi og at halda áfram við sama góða búskaparpolitikkin er altavgerandi fyri tey komandi fýra árini. Kunnu vit halda fram við somu samgongu, so er einki til hindurs fyri, at vit taka stór fet móti fullveldinum, sigur Rani Nolsøe.

## Javnstøða á listanum hjá Norðoya Tjóðveldisfelag

**Eins nógvar kvinnur sum menn stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin í Norðoyggjum**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Listin hjá Norðoya Tjóðveldisfelag er gjørdur í røttum javnstøðuanda. Felagið avgjørdi á triðja uppstillingarfundi at stilla upp 6 valevni til komandi løgtingsval; 3 kvinnur og 3 menn.

Tad er fyrstu ferð, at uppstillingin er jøvn millum kynini. Hetta má sigast at vera nýskapandi í føroyskum politikki. Arbeitt hevur verið leingi vid at fáa kvinnurnar meira við í politikk, og hetta er so veruleiki á listanum hjá Norðoya Tjóðveldisfelag, skrivar Norðoyggja Tjóðveldisfelag í tíðndaskrivi.

Listin telur fleiri kend nøvn. Karsten Hansen og Heini O. Heinesen fara óivað at kappast um ovastu rók á listanum. Onkur á listanum er eisini heilt nýggjur í landspolitikki.

Listin telur fleiri kend nøvn. Listin er hesin í bókstavarøð:

Olga Biskopstø, samfelagsfrøðingur, Klaksvík
Dánjal Jákup Hansen, maskinmeistari, Norðoyri
Karsten Hansen, landsstýrismaður, Klaksvík
Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, Kunoy
Jórun Høgnesen, býráðslimur, Klaksvík
Katrin Næs, studentaskúlalærari, Hvannasund